# Tryggingarfelagið í umbygdum høl

**Fríggjadagin skipaði Tryggingarfelagið Føroyar fyri móttøku í Saltangará, nú hølini hjá felagnum á Skálafjørðinum eru umbygd og nútímansgjørd, bæði innan og uttan**

MÓTTØKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Væl av fólki var til móttøkuna, sum varð hildin við góðum pinnamati og leskandi.

Deildarleiðarin, Niels Juul Akraberg og tey 10 starvsfólkini, hann hevur á deildini, høvdu úr at gera við at taka í hondina á fólki, sum ynsktu teimum tillukku við hølunum.

Undir móttøkuni spældi Jóannes S. Hansen friðarligan og vælljómandi tónleik á klaver, og seinni spældu eisini Monika Stauss Joensen og Dánjál Eysturstein nøkur verk á violin og klaver.

Tilsamans settu tey trý ein hugnaligan dám á móttøkuna, har fólk komu á gátt at ynskja tryggingarfólkunum tillukku við nýggju og snotuligu hølunum.

Hølini, har Tryggingarfelagið Føroyar eftirhondini hevur húsast í fleiri ár, liggja væl fyri miðskeiðis í "hjartanum" í Runavíkar kommunu, men nú helt felagið, at tíðin var komin til byggja hølini um, so tey gerast meira kunda-vinarlig.



*Bygningurin er klæddur av nýggjum, og innan eru umbyggingar gjørdar sum gera hølini meira kunda-vinarlig*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*




*Stjórin í Tryggingarfelagnum Føroyar, Gunnar í Liða, hevur handað Bláa Kross-leiðaranum, Jaspuri Langgaard, kekkin*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Gáva til Bláa Kross**

Við móttøkuna greiddi stjórin í Tryggingarfelagnum Føroyar, Gunnar í Liða, frá teimum broytingum og umbyggingum, ið eru gjørdar, og hann legði dent á, at stigini eru tikin fyri framhaldandi at tæna viðskiftafólkunum.

Hann helt, at Tryggingarfelagið Føroyar hevur allar fyritreytir fyri at veita viðskiftafólki eina holla tænastu.

Gunnar í Liða segði, at felagið hevur avgjørt at veita Bláa Krossi eina peningagávu til tað arbeiði, sum felagsskapurin ger.

Tað var leiðarin á Bláa Krossi, Jaspur Langgaard, ið tók ímóti kekkinum, sum var upp á 20.000 krónur.

Saman við starvsfólkum sínum fegnaðist hann um gávuna, sum hann segði, at felagsskapurin fer at nýta til fyribyrgjandi arbeiði.

## Gávan fer til fyribyrgjandi arbeiði

**Leiðarin á Bláa Krossi, Jaspur Langgaard, segði, at gávan, sum felagsskapurin hevur fingið frá Tryggingarfelagnum Føroyar, fer til fyribyrgjandi arbeiði**

GÁVA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í takkarrøðu síni, segði Jaspur Langgaard, leiðari á Bláa Krossi, at viðurkenningin, sum Tryggingarfelagið Føroyar hevur givið felagsskapinum, er fløv0andi.

- Ja, ein slík viðurkenning fløvar mangan meira, enn fólk geva sær far um. Hetta er við til at stimbra alt arbeiði í felagsskapinum.

Hann segði seg fegnast um, at fólk síggja tað arbeiði, sum felagsskapurin ger – og seta prís upp á tað.

-Virksemið hjá Bláa Krossi er ikki ólíkt virkseminum hjá Tryggingarfelagnum. Endamálið hjá báðum er at hjálpa teimum, sum eru komin illa fyri. Skaðin kann vera komin brádliga – og skaðin kann hava arbeitt seg upp gjøgnum eina tíð.

Jaspur vísti á, at meðan Tryggingarfelagið í stóran mun arbeiðir við materiellum skaðum, arbeiðir Blái Krossur mest við menniskjansligum og sálarligum skaðum.

- Men tær royndir, sum vit hava gjørt okkum síðstu árini, er, at besta hjálpin er so vítt sum gjørligt at fyribyrgja, at skaðin hendir. Hetta kann sjálvandi gerast upp á nógvar mátar, bæði við stórum og smáum tingum. Hann segði, at Blái Krossur fer at nýta gávuna, sum Tryggingarfelagið hevur givið felagsskapinum, til fyribyrgjandi arbeiði.

At enda ynskti Jaspur Langgaard hjartaliga tillukku við nýggju hølunum og takkaði fyri tað samstarv, sum felagsskapurin hevur við felagið.

-Tit hava megnað at hildið fast um persónligu "kontaktina" við viðskiftafólkini, og tað vil eg takka tykkum fyri, segði Blá Kross-leiðarin.



*Jaspur Langgaard, leiðari fyri Bláa Krossi, saman við einum av sínum starvsfeløgum, Tórhild Bjarkhamar. Felagsskapurin er fegin um viðurkenningina, sum Tryggingarfelagið hevur sýnt við peningagávuni*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*